# Fólk taka væl undir við jólabýnum



**Tórshavnar kommuna hevur yvirtikið hugnaliga jólabýin, sum Sjónvarp Føroya lat gera í sambandi við Jólakalendaran í ár. Fólk kunnu vitja býin í vikuskiftinum, og tey taka væl undir við tiltakinum**

*Solby A. Eliasen*
*solby@mail.djh.dk*

Jólaprýði, jólalutir, jólatónleik, jólagóðgæti og alt sum hoyrir jólunum til er at fáa í Jólabýnum á Reyni í Havn. Tórshavnar kommuna hevur yvirtikið býin fyri at gera hann ein part av jólahugnanum í kommununi. Býurin er opin fyri almenninginum í vikuskiftinum. Seinasta vikuskiftið var hann opin frá 16 til 19, men tað eydnaðist ikki so væl, tí tá Jólagøtan í Sjónvarpinum byrjaði kl. 18, vildu øll børnini sjálvsagt vera heima.

- Tann seinasta tíman vóru ikki nógv fólk eftir, sigur Barbara Danielsen frá Tórshavnar kommunu.

Av tí sama er gjørt av, at jólabýurin komandi vikuskiftið verður opin frá kl. 15 og letur aftur, tá Jólagøtan fer í luftina.

Barbara sigur, at áhugin fyri jólasøluni í jólabýnum á Reyni er sera stórur, og tað eru mong, sum hava biðið loyva sær at hava ein bás. Tí umhugsa fyrireikararnir at lata býin upp aðrar tíðir eisini. Eitt nú seinastu vikuna áðrenn jól. Men hetta hava tey ikki endaliga avgjørt enn.

Fólk hava tikið sera væl undir við jólabýnum, og jólabýurin er komin fyri at verða. Tað vil siga, at fólk eisini kunna vænta, at høvi verður at vitja jólabýin í høvuðsstaðnum aftur næstu jól.


























